


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Arbeiðsmarknaðurin ynskti ein Arbeiðsmarknaðardepil, landsstýrismaðurin var líkaglaður



HEÐIN D. POULSEN
Sjálvstýrisflokkurin

Á sumri 2007 heittu partarnir á arbeiðsmarknaðinum, arbeiðsgevarar lið um lið við arbeiðstakarafeløgini á Landsstýrismannin í Vinnumálum um at skipa Arbeiðsloysisskipanina í ein Arbeiðsmarknaðardepil. Handan uppskotið lá neyvt tilmæli við neyðugum lógaruppskotum og annað sum skuldi til fyri at føra visiónina út í verkið.

**Politiski myndugleikin lurtaði ikki eftir pørtunum á arbeiðsmarknaðinum**
Áheitanin fall fyri deyv oyru, tí har spurdist einki burturúr. Í staðin avgjørdi Bjarni Djurholm landsstýrismaðurin at leggja eitt eldri lógaruppskot fram á ting. Av tí, at hetta varð lagt fram so seint, náddi tað ikki at verða viðgjørt í tinginum, og fall tískil burtur, tá løgmaður skrivaði út nývál.
Sum Kartni Ravnsfjall limur í stýrinum hjá ALS sigur í síðsta pedagogblaðnum, so er endamálið: "at savna stovnar, nevndir og ráð, sum hava við arbeiðsmarknaðin at gera, soleiðis at greiður skilnaður fæst millum arbeiðsmarknað og politikk."

**Sjálvstøðug Barsilsskipan partur av uppskotinum**
Hóast Barsilskipanin verður fíggjað av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, er Barsilskipanin á fíggjarlóg landsins og tey síðstu árini tá avlop hevur verið, eru milliónirnar, sum annars eru markaðar til barsilsgjald, farnar aftur í landskassan.

**Partur av uppskotinum hjá arbeiðsmarknaðinum var at skipa**
Barsilsskipanina sum ein sjálvstøðugan grunn, soleiðis at pengarnir hjá Barsilsskipanini kundu vaksa, og ikki sum nú fordampa.

Í mun til verandi politisku leiðslu, fer Sjálvstýrisflokkurin at hava eitt tætt samstarv við arbeiðsmarknaðin, og lurta eftir tørvinum hjá arbeiðsmarknaðinum. Í førum sum hesum, tá ein samdur arbeiðsmarknaður kemur við einum tilmæli, fara vit at lurta. Tað ber ikki til at siga, at man ikki skilur vinnuna.

**Meira um hetta og annað á www.hedindp.com**

# 1800 m flogbreyt í Vágunum - sjálvandi!!



JOHAN DAHL
løgtingsmaður

Nú vit hava samtykt at útbyggja flogvøllin bæði við leinging av breyt og tøkni umframt terminalin, so er tað umráðandi at vit gera tað sum rætt er - nevniliga at leingja breytina út á 1800 m heldur enn 1600 m og harvið gera tað møguligt hjá størri flogførum at nýta vøllin .
At koyra grús í maskinaríið sum summi royna at gera nú er ikki rætt, - vit vita øll, at tað, at fari undir fyrst kanningar og síðan projektering og gerð av flogvøllið á einum øðrum hóskandi staðið, vil takað fleiri ár og tað hava vit ikki ráð at bíða eftir,- tí eiga vit nú at gera tað einasta rættað, - tað er at fremja útbyggingina av Vága floghavn sum sett er út í kortið – við at játtað neyðuga peningin afturat so Vága Floghavn fær 1800 m flogbreyt.

# Altjóðagerðin



FRÍÐFINNUR JOHNSSON
Tjóðveldi
www.tjodveldi.fo/fridfinnur

Tjóðveldi er einki at vera bangin fyri
Tjóðveldi er ein møguleiki
Altjóðagerðin er í dag størsti møguleikin fyri menning.
Føroyar eru ikki beinleiðis við í altjóðagerðini, tí vit eru ikki ein tjóð við altjóða rættindum. Vit verða í flestu førum umboðaðir av dønum.
Kunnu vit siga nakað um, hvat ið tað hevði givið meira, um føroyingar sjálvir vóru umboðaðir. Jú, tað kunnu vit. Orðatakið sigur: "Har ið tú ikki ert sjálvur, har er tú ikki meira enn hálvur." Orðatakið vil vera við, at vit høvdu fingið minst dupult so nógv burtur úr altjóðagerðini, um vit sjálvir vóru umboðaðir í altjóða sambondum.
Tjóðveldi vil, at vit sjálvi skulu vera við í altjóða sambondum.

# Gott, Marita Rasmussen



KITTY MAY ELLEFSEN
Fólkaflokkurin

Tað man neyvan vera nakar, sum ikki er samdur við nýggja stjóranum í Vinnuhúsinum, Maritu Rasmussen í, at vit sjálvandi eiga og skulu raðfesta útbúgving og gransking høgt og at tíðin er komin til at flyta okkum frá orðum til gerðir.
Og tað er hugaligt, at ein so skilagóð útmelding kemur frá vinnuni – og at vinnan eisini ætlar at spæla við, tá tíðin er búgvin til tess.
Seinastu árini hava vit hoyrt fleiri neyðarróp frá vinnuni um, at tørvur er á arbeiðsmegi; samstundis sum vit ikki hava havt dirvi til at lata upp fyri arbeiðsmarknaði okkara. Tað er eingin loyna, at her hevur tað verið Javnaðarflokkurin, sum hevur viljað ofrað landsins búskaparvøkstur og vælferð fyri egnan løtuvinning.
Við seinastu tølunum um kynssamanseting og manglandi tilflyting av útbúnari arbeiðsmegi er greitt, at Føroyar eisini her eru við at gerast ein eftirbátur og stundin er komin til at vit gera nakað – og vit skulu gera tað skjótt.
Tí er greiði boðskapurin: - latið okkum í komandi valskeiði seta sjøtul á – og byrja at arbeiða við at fáa eitt vælvirkandi føroyskt útbúgvingarverk; bæði í fólkaskúlanum, miðnámsskúlunum og einum komandi universiteti, sum dregur til sín og mennir vitanartilfeingið og harvið er við til at menna land okkara.

# Cruiseskip. Kom á eina Luxusferð



JOEN PETER PETERSEN
Sambandsflokkurin

Ja nú er eitt sindur meira enn ein vika til at tú skal atkvøða, um hvør skal vera skipari hjá tær tey næstu 4 árini, skal tú vera við á ferðini, ella ætlar tú tær í bjargingarbátin hjá Tjóðveldinum og hansara líkum, við at blaka 320 milliónir vekk.
Vit í Sambandsflokkinum ætla okkum at vera á skútini , og stýra vilja vit, tað besta fyri okkara mannig og lønin er góð.

**Lønin er**
Skúlar skulu dagførast – bæði fysiskt og í innihaldsliga.
Lærarar og pedagogar eftirútbúgvast.
Næmingar hava undirvísing, ið lyfta teir upp á eitt hægri vitanarstig.
Fólkaskúlin skal væl upp eftir PISA-stiganum komandi árini.
Stimbra tiltøk – t.d. bústaðarmøguleikar, barnaansing, frítíðartilboð, starvsmøguleikar – sum eggja fólki at flyta til Føroya.
Serligan dent á at fáa kvinnurnar heim aftur eftir loknan lestur.
Betri útbúgvingarstuðul skal eggja fleiri at taka miðnámsútbúgvingar og síðani hægri útbúgvingar.
18 ára markið fyri stuðli skal niður á 16 ár.
Serligan dent á at hjálpa einligum mammum, sum í dag hava skerdar møguleikar.
Vinnuháskúlin skal gerast til ein altjóða hægri lærustovn við sjóvinnuútbúgvingum.
Hægri fiskivinnuútbúgving skal setast á stovn í Føroyum.'

**X við
Joen Peter Petersen
Sambandsflokkurin**

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við